# Hugsaðu ikki um at verja



Mynd: Álvur Haraldsen

**HONDBÓLTUR** 74 mál vóru skotin í alt, tá álopssinnaðu Neistin og StÍF hittust í høllini á Hálsi

Uni Holm Johannesen

Heimasíðan hjá Neistanum er beinrakin.

– Í høllini á Hálsi í dag kom ein við uppskotinum, at áskoðararnir burdu fingið 35 krónur aftur. Áskoðarar áttu at goldið 35 krónur fyri álopsspælið, og ongar pengar fyri verjuspælið, tí verjuspælið var undir alt lágmark. Spælarar á báðum liðunum tíma rætt og slætt ikki at renna aftur at verja, tí síggja vit ørgrynni av skjótálopum og heili 74 mál, skrivar heimasíðan.

Fremst á dagsskránni var málskjóting í gjár.

Málini rapladu inn allan dystin á tamb.

Neistain vann 39-35 tá avtornaði.

## Togaðust leingi

Sjúrður Thomassen, Neistin, segði við Sosialin í november, at verandi greipuvinnararnir hugsa ikki bara um at vinna dystirnar, men eisini, hvussu liðið vinnur dystirnar.

Leikararnir seta sær smá innanhýsis mál undan hvørjum dysti, umframt at fáa tvey stig í skjáttuna.

Neistin spældi við fríum teymum hesaferð. Verjuspælið var lítið skipað og lítið sannførandi.

Jugoslav Djumic og David Edvardsen vóru bestu skjúttarnir. Teir skutu ávikavist 10 mál og átta mál.

## Fóru undan til seinast

StÍF hótti oddaliðið leingi.

Støðan var 25-25, tá seinni hálvleikur var hálvrunnin. Tá fór Neistin undan gestunum í smáum. Tvey til trý mál skiltu liðini seinastu løtuna.

Neistin hevur framvegis bara mist eitt stig í hesum kappingarárinum.

StÍF hevur bara fingið seks stig higartil. Liðið av Skálafjørðinum er níggju stig frá finaluplássinum í løtuni.

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 11 | 390 | 299 | 91 | 21 |
| 2 | KÍF | 11 | 311 | 282 | 29 | 15 |
| 3 | VÍF | 12 | 331 | 301 | 30 | 12 |
| 4 | H71 | 11 | 293 | 292 | 1 | 12 |
| 5 | Kyndil | 10 | 256 | 247 | 9 | 10 |
| 6 | StÍF | 10 | 256 | 257 | -1 | 6 |
| 7 | Team Klaksvík | 11 | 238 | 397 | -159 | 0 |

**StÍF – Kyndil** . . . . . . . . . . . mikudagin, 15. desember . . . . . . . . . . klokkan 19.00
**Team Klaksvík – H71** . . . . . . hósdagin, 16. desember. . . . . . . . . . . klokkan 19.00
**StÍF – KÍF** . . . . . . . . . . . . . leygardagin, 18. desember . . . . . . . . klokkan 16.00
**Kyndil – Neistin**. . . . . . . . . leygardagin, 18. desember . . . . . . . . klokkan 16.00



Mynd: Álvur Haraldsen

# VÍF nærkast finaluplássinum

**HONDBÓLTUR** Vestmenningar vunnu tvey kærkomin stig í Kollafirði í gjár. VÍF er trý stig frá finaluplássinum í løtuni

Uni Holm Johannesen

VÍF vann seg eitt fet nærri finaluplássinum í gjár. Vestmenningar vunnu við fimm málum í Kollafirði.

Úrslitið var 30-25. Hálvleiksstøðan var 12-12.

## Gjørdu bart

Liðini skiftust at hava leiðsluna í fyrra hálvleiki.

VÍF legði meira fyri aftaná steðgin, og serliga var nógv veiggj í álopsspælinum. Áki G. Olsen, Bjarti Hansen, Sámal Joensen og hinir gjørdu bart og skutu 18 mál í alt.

KÍF hótti ongantíð leiðsluna.

# H71 setti grannarnar av

**HONDBÓLTUR** H71 vann við trimum málum, tá Kyndil vitjaði í høllini á Hálsi leygardagin. Úrslitið hevur við sær, at grønlittu havnarmenninir hava mist sambandið við finaluplássini fyribils

Uni Holm Johannesen

Úrslitið var 23-20.

Kyndil fekk fyrsta málið aftaná steðgin, tá gestirnir skutu seg upp á 13-12. Tá vóru grannarnir á odda fyri fyrstu ferð í dystinum.

Liðini togaðust til seinastu tíggju minuttirnar, tá heimaliðið streyk avstað og vann sær eina greiða leiðslu.

Hoyvíkingarnir vóru stríðshugaðir og ágrýtnir í verjuspælinum.

Esbern Patursson er fegin.

– Dysturin er javnur, og tað er serliga umráðandi, at vit eru stinnir í verjupartinum. Vit spæla uttan nakran linjuspælara í álopinum, og tað vísir seg at rigga væl. Bogdan Florea fær nøkur umráðandi mál seinastu løtuna, og tað ger munin, sigur Esbern Patursson, sum vónar, at hoyvíkingar vinna seg í finaluni. Men eitt triðja pláss er nøktandi, sum hann tekur til.

## Erlendur stóð væl

Erlendur Patursson vardi málið hjá Kyndli.

Hann varð serliga eyðsýndur, tí hann vardi fyri flestu brotskøstunum.

Dánjal Torgarð er vanligur brotskastskjútti hjá H71. Hann situr uttan fyri við skaða í løtuni.

Aðrir royndu seg, men Erlendur vardi væl.

## Fimm stig upp

Kyndil hevur staðið seg minni væl seinastu dystirnar.

Julian Johansen, Kyndil, heldur seg vita ein av orsøkunum.

– Tað vísir seg, at vit misnýta ov nógvar upplagdar møguleikar. Tað hevur verið ein trupulleiki í fleiri dystum. H71 fær bara 23 mál hesaferð, og tað er nøktandi verjuspæl. Men vit skjóta bara 20 mál, sigur Julian Johansen.

Høvuðsstaðarliðið hevur bara vunnið á Team Klaksvík í seinastu seks dystunum. Liðið hevur fimm stig upp til KÍF, sum er nummar tvey og á finaluplássi.

H71 er nummar fýra við 12 stigum – trý færri enn kollfirðingar.